# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Stjørnan dominerar

**Tá tosað verður um kvinnuhondbólt, so kemst ikki uttanum at tosa um Neistan, ið hevur vunnið Føroyameistaraheitið heili 36 ferðir. Seinastu árini hava meistaraheitini verið spjadd, men tað tykist sum um ein maktfaktorur av teimum heilt stóru er vaksin í Klaksvík**

HONDBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Vinnur Stjørnan FM í ár, er tað teirra triðja á rað, og so er Stjørnan rættuliga komin í gongd, við at stabilisera seg sum eina hóttan móti Neistanum, og teirra ótrúligu mongd av meistaraheitum.

### 36 ferðir síðan 1943

Føroyskar kvinnur spældu hondbólt fyri fyrstu ferð afturi í 1943, og tað fyrsta árið vann Neistin. Eftir hetta vunnu tær fleiri meistaraheitir, og tá tær í 1952 vunnu sítt fjórða meistaraheitið, vísti tað seg, at ein nýggj tíð var byrjað. Næstu seks árini vann Neistin øll, og við jøvnum millumbilum síðan, hava tær vunnið nøkur meistaraheitir á rað. Tað mesta tær hava megnað at vunnið á rað, er heili nýggju meistaraheitir.

Hetta megnar avrik verður ikki tikið í ár, men

*Av teimum báðum liðunum í FM-finaluni í ár, má Stjørnan vera at meta sum favorittar. Tær hava vunnið allar fýra dystirnar móti Neistanum í ár, og miðalmálmunurin er áljóðandi 11,5 mál, og tað sigur ikki so heilt lítið. Hóast hesa sannroynd, so er tað talan um finalur, og har spæla liðini ein dyst hvør á heimavøli, og tá kann í veruleikanum alt henda*



við styrkini á Stjørnuliðnum, og um tær megna at fornýggja hópin við ungum talentum, er tað kanska størsta hóttanin móti teimum 36 meistaraheitunum hjá havnaliðnum.

Sjálvt um Stjørnan vinnur í ár, so fara tað at ganga ein rúm tíð, áðrenn riðilin av meistaraheitum hjá Neistanum verður tikin aftur, tí Stjørnan er nummar tvey á listanum yvir vunnin meistaraheitir, og teir hava »bert« seks meistaraheitir. So tann dominansurin broytist í øllum førum ikki við bræði.

### Kappingarárið hjá finalistunum

Stjørnan hevur verið so nógv tað sterkasta liðið í føroyskum kvinnuhondbólti í ár, og tær hava bert tapt ein dyst, og spælt ein javnan. Allar hinar 18 dystirnar hava klaksvíkskvinnur vunnið. Teir báðir dystirnar, Stjørnan hevur mist stig í, eru merkisvert

Hinvegin hevur tað gingið heldur trilvandi hjá Neistanum, ið tó við innanhýsis sigri móti VB, vann sær finalusessin.

Serliga VB munnu kanska føla seg illa viðfarin av Hondbóltssambandinum, tí í avgerandi næstseinasta umfarinum, vórðu tær settar at spæla ein truplan útidyst á Skaál móti StÍF, og so ein enn truplari og avgerandi dyst móti Neistanum í Havn. Dystin á Skála vann VB 24-23, men í Havn tóktust kreftirnar at vera gingnar undan, og tær taptu tepurt 24-23 móti Neistanum. Sostatt var greitt at Neistin vann sær finalusessin, í staðin fyri VB í ársins FM-finalu.

## Bára Skaale Klakstein



**Stórt trýst frá byrjan**

Bára Skaale Klakstein gleðist yvir at venjari teirra, Henrik Gerster, verður verandi í felagnum, eitt ár afturat, og hon gleðir seg til bæði finalu, eins væl og til komandi kappingarár, tá Europa Cup dystir aftur vera á skránni.

*Hvussu hevur tað verið, at hildið tykkum motiveraðar til at halda dampinum uppi?*
- Vit hava havt super venjingar, hvørja einastu ferð, líka frá byrjan, og tað hevur ongantíð verið ein spurningur um at halda geistinum uppi. Tað er ein øðiligur vilji á liðnum.

*Tit hava vunnið við á leið 10 málum í trimum dystum móti Neistanum í ár, eru vónirnar góðar undan FM-finaluni?*
- Ja vónirnar eru avgjørt sera góðar. Vit vita hvat vit megna, og vit ætla okkum at vísa tað aftur í kvøld.

*Er tú samd í favoritt útnevnanini hjá tykkum?*
- Ja eg eri avgjørt samd. Vit hava nógv tað sterkasta liðið, og vit hava stórt fjølbroytni á liðnum. Vit kunnu hótta frá fleiri plássum, og fleiri ungar og svangar eru á liðnum, so er eri stillisliga sannførd um, at vit avgera finaluna til okkara fyrimun, innanfyri tvær tær fyrstu finalurnar, so vit sleppa frá at spæla eina møguliga triðju.

*Hvussu er hópurin fyri hjá tykkum, hvat skaðum og øðrum viðvíkur?*
- Nú høvdu vit trupulleikar á málverjaplássinum, eftir at Maria Ziskason varð skadd móti VÍF (knæskaða), men hon er komið somikið fyri seg, at hon bert er ivasom. Annars kemur Lise Hjort Hansen heim, so tað plássið er í øllum førum væl vart, líkamikið hvat. Annars er hópurin væl fyri, og sera spentur uppá at byrja finaluna í kvøld, sigur Bára Skaale Klakstein, álitið á vonginum hjá Stjørnuni

## Unn Kragesteen



**Urkreftirnar skulu bera okkum til sigurs**

Vit fingu orðið á Unn Kragesteen hjá Neistanum og Báru Skaale Klakstein hjá Stjørnuni, um vónir teirra til FM-finalurnar, ið liggja fyri framman.

*Er tú samd við mær í, at Stjørnan má vera at meta sum favorittar?*
- Ja Stjørnan eru stórfavorittar, og tær koma óivað sum eitt óløgið móti okkum í kvøld, men vit mugu menna okkum upp og standa ímóti.

*Hvat skulu tit gera rætt, skulu tit gera tykkum nakrar vónir um at koppa suverena oddaliðnum?*
- Nú eru liðini nullstillaði, og alt kann henda. Men vit skulu leggja dent á at fáa okkara sermerkta spæl at flóta til fulnar, og annars finna urkreftirnar í okkum fram. Gera vit ikki tað, so verður tað ein sera tung mótbrekka.

*Hvussu ber tað til, at Stjørnan hevur so gott tak á tykkum í inniverandi kappingarári?*
- Okkara spæli stílur passar kanska sera væl til tann hjá klaksvíkskvinnum. Vit spæla kvikan hondbólt við nógvum álopum, og tað gevur vanliga Stjørnuni á leið 60 avslutningar pr. dyst, og tá tær eru so effektivar, ja so er sjón fyri søgn, hvussu tað kann enda. Men vit broyta onki, uttan at vit sjálvar ætla okkum at vera effektivar, og sjálvandi steðga mótstøðuliðnum.

*Hvussu er hópurin fyri hjá tykkum, hvat skaðum og øðrum viðvíkur?*
- Hópurin er fullmannaður, og Elin Stakksund er komin heim, aftaná at hava verið uttanlands eitt skifti. So vit eru klárar til finalurnar móti Stjørnuni. Hóast mótstøðan kann tykjast ræðandi til tíðir, so ætla vit okkum avgjørt ikki at bakka, sigur Unn Kragesteen, ein av álitunum á Neistaliðnum.

## HAGTØL

**Innanhýsisdystirnar hjá Neistanum og Stjørnuni í ár:**

| | |
|---|---|
| Neistin-Stjørnan 18-28 | (14. oktober 2007) |
| Stjørnan-Neistin 32-24 | (22. desember 2007) |
| Neistin-Stjørnan 17-32 | (20. januar 2008) |
| Stjørnan-Neistin 34-22 | (26. februar 2008) |

## HAGTØL

**Vinnarar frá 1943-2007:**

| | |
|---|---|
| Neistin | 36 |
| Stjørnan | 6 |
| Kyndil | 5 |
| VÍF | 5 |
| Søljan | 5 |
| VB | 3 |
| Skála | 2 |
| Vípan | 2 |
| EB | 1 |